UTTAN ÚR HEIMI

# Krevja hann dømdan til deyða

**Tann einasti gíslarænarin, sum bleiv tikin eftir blóðbaðið í skúlanum í Beslan, er nú dømdur**

GÍSLATØKA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Rætturin er komin til ta niðurstøðu, at Nurpasji Kulajev tók lut í tí vápnaða álopinum, og at hann var við til at drepa verjuleys fólk. Hann tók lut í einari yvirgangsatsókn, sum hevði til endamáls at leggja trýst á myndugleikarnar, segði dómarin, tá hann feldi dómin.

Nurpasji Kulajev er tann einasti av gíslarænarunum, sum er eftir á lívi eftir hópmorðið í skúla nummar eitt í suðurrussiska býnum Beslan fyrst í september í 2004. Álopið kostaði næstan 400 mannalív, og millum tey deyðu vóru 186 børn. Russiska ákæruvaldið hevur kravt, at Nurpasji Kulajev skal dømast til deyða.

Fólk í Beslan hava alla tíðina fýlst á framferðina hjá myndugleikunum undir gíslatøkuni, og herurin hevur fingið skyldina av, at atsóknin kostaði so mong mannalív. Í gjár segði Vladimir Putin, forseti, at myndugleikarnir fara at kanna alt málið til botns av nýggjum.



*Í hesum kirkjugarðinum liggja børnini, sum doyðu í gíslatøkuni, jarðað.*

Sambært russisku myndugleikunum vóru tað kekenskir uppreistrarmenn, sum lupu á skúlan í Beslan, men nógvir russar halda, at teir fingu hjálp til álopið.

# Bush revsar Chavez

**Teir sita ikki væl um sátt, forsetarnir í USA og Venesuela, og nú hevur USA sett tiltøk í verk.**

ÓSEMJA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í áravís hava George W. Bush og Hugo Chavez lagt hvør annan undir bæði líkt og ólíkt og hótt hvør annan. Í gjár gjørdi Bush so álvara av sínum hóttanum við at seta ávís handilstøk í verk ímóti Venesuela við teirri grundgeving, at landið vil ikki samstarva við USA í bardaganum ímóti yvirgangi.



*Bush hevur mist tolið við Chavez og hevur sett handilstiltøk í verk ímóti Venesuela.*

Hugo Chavez, sum er á vitjan í London í hesum døgum, var skjótur at svara.

– Tað eru ikki vit, sum leypa á onnur lond, segði hann í gjár og skoytti uppí, at handilstiltøkini eru eitt dømi um tann amerikanska hjálandapolitikkin ímóti teimum smáu londunum á Jørðini.

UDA keypir nógva olju úr Venesuela, men stjórnini í Washington hóvar ikki politikkin hjá tí vinstrasinnaða Chavez, og at hann hevur tætt samband við lond sum Kuba og Iran, sum sambært amerikanarum styðja altjóða yvirgang.

Hugo Chavez vísir øllum skuldsetingunum aftur og vísir á, at Venesuela hjálpir stjórnini í Kolombia í bardaganum við uppreistrarmenn og rúsevnisharkalið, júst sum USA ger.

# Dýrir dagar hjá Røkke

**Virðið á feløgunum, sum eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Oslo, er fallið óvanliga nógv teir seinastu dagarnar.**

KURSFALL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Undan seinasta vikuskifti vórufeløgini, sum eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Oslo, næstan 1.900 milliardir norskar krónur verd, men í gjár var virðið minkað góðar 100 milliardir krónur. Tað merkir, at eigararnir mistu næstan líka nógv, sum allar tær norsku kommunurnar fáa í inntøku- og ognarskatti í ár, skrivar Aftenposten. Tað felagið, sum fall mest í virði, var almenna oljufelagið Statoil, hvørs virði minkaði næstan 21 milliardir norskar krónur.

Millum teirra, sum hava mist mest, er tann kendi vinnulívsmaðurin Kjell Inge Røkke. Aftenposten skrivar, at partabrøvini í fyritøkuni Aker-Kværner fullu 6,4 prosent, sum svarar til smáar 2,4 milliardir krónur. Hjá skipasmiðjufelagnum Aker Yards gekst heldur frægari, men kortini minkaði virðið eina góða milliard. Holdingfelagið Aker fekk harafturímóti ein frammaná og minkaði góðar tvær milliardir krónur í virði.

STUTT SAGT

## Størri dent á ærudráp

Í gjár byrjaði rættarmálið ímóti einum heilum húski, sum er ákært í sambandi við morðið á eina unga muslimska kvinnu í Slagelse í Danmark í fjør. Myndugleikarnir rokna morðið sum eitt sokallað ærudráp. Ákæruvaldið vil vera við, at tað var beiggi kvinnuna, sum myrdi hana, tí hon hevði gift seg við einum øðrum manni enn honum, sum skyldfólkini høvdu ætlað henni. Beiggin hevur játtað seg sekan. Ákæruvaldið vil eisini vera við, at alt húskið legði morðið til rættis ella medvirkaði til tað, og tí eru øll ákærd.

Undir kanningunum er komið fram, at kvinnan og maður hennara vendu sær til løgregluna stutt undan morðinum, tí tey kendu seg hótt, men at løgreglan gjørdi einki við málið. Men soleiðis verður tað ikki í framtíðini, sigur Kurt Kragh, sum er kriminalinspektørur hjá ferðaliðnum.

Hann væntar, at løgreglan og aðrir myndugleikar fara at leggja størri dent á slík mál í framtíðini. Sjálvur væntar hann ikki, at tilburðurin við teimum ungu hjúnunum er tann seinasti av sínum slagi.

## Opium úr Afghanistan

Myndugleikarnir í Tadjikistan kæra seg um, at afghanar dyrka opium sum ongantíð fyrr, og nú vilja teir hava altjóða samfelagið at gera okkurt við gongdina.

Tadjikiski forsetin, Rakhmonov, segði á einari altjóða ráðstevnu í gjár, at opiumdyrkingin í Afghanistan er trýfaldað tey seinastu árini, og at hvørki teir afghonsku myndugleikarnir ella teir útlendsku hermenninir í landinum hava megnað at tálma gongdini.

– Tað er neyðugt at veita bøndrunum stuðul, so teir kunnu dyrka okkurt annað enn opium, segði tadjikiski forsetin á ráðstevnuni. Amerikanarar hava leingið kært seg um, at bøndurnir í Afghanistan halda fram við at dyrka opium, og allar royndir at fáa teir at leggja um til okkurt annað eru miseydnaðar.

## Tjóðsangur skal ikki týðast

Í morgin er tjóðardagur Noregs, og í tí sambandi hava røddir verið frammi um at týða tjóðsangin "Ja, vi elsker dette landet" til fremmand mál, so innflytararnir kunnu syngja við á hátíðarhaldum í morgin.

Men Framburðsflokkurin, sum sambært meiningakanningum er landsins største í løtuni, heldur tað vera púra burturvið at týða tjóðsangin. Flokkurinm sigur, at tað hevði verið eitt afturstig fyri royndirnar at fáa tey fremmandu at læra seg norskt. Kunnu tey, sum nýliga eru komin, ikki syngja tjóðsangin á norskum, kunnu tey murra lagið, sigur Per-Willy Amundsen, sum er framsøgumaður hjá Framburðsflokkinum í innflytaramálum.

Blaðstjórinm á minnilutablaðnum "Utrop", Majoran Vivekanathan, heldur harafturímóti, at uppskotið at týða tjóðsangin er frálíkt, tí tað hevði givið ta røttu myndina av Noregi sum einum fleirmentaðum samfelag, sigur hann við blaðið Vårt Land.

Eitt av teimum fremmandu málunum, sum hevur verið upp á tal, er urdu, og so hevði "Ja, vi elsker dette landet! itið "Haan ji, hume is mulkh se mohabbat hai".

## Bjarnir ótu apu

Tað er rættiliga sjáldsamt, at bjarnir gera seg inn á onnur djór í djóragørðum, men sunnudagin løgdu tríggjar bjarnir á eina apu í einum djóragarði í Eindhoven í Niðurlondum.

Leiðslan í Beekse Bergen-djóragarðinum sigur við tíðindastovuna AP, at bjarnirnar róku apuna upp í ein krók, og tá hon royndi at sleppa til rýmingar upp eftir rimunum, løgdu tær á hana. Starvsfólkini ropyndu at fáa bjarnirnar at sleppa apuni, men til fánýtis. Bjarnirnar tóku apuna við sær og ótu hana.